Hiti í Havn

Mikumorgun 4. mei klokkan 08.00 letur handilin Hiti upp í Stoffalág í Tórshavn. Tríggir garvaðir VHS-menn eiga og reka handilin

NÝGGJUR HANDIL
tíðndaskriv

Vanligi privatkundin fer nú at kenna fløvan av einum nýggjum handli. Aðalendamálið hjá hesum handlinum er tænasta í sambandi við rør, hita og sanitet til sethús. Hugnaligi handilin, ið eitur Hiti, heldur til í Stoffalág, har ið PE-kolonial var seinastu árini. Sjálv handilshølini eru okkurt um 100 fermetrar til støddar, og goymsluflatin er á leið eins stórur.

Menninir, sum hava stovnað og fara at reka handilin, eru Áki Mortensen, sum er stjóri, og Jákup Hanusson og Suni Danielsen. Allir tríggir hava dyggar royndir í yrkinum. Áki og Jákup hava lært til og starvast sum VHS-krambúðarkallar í mong ár, og Suni er maskinsmiður við serligum kunnleika til rørarbeiði.

Stovnararnir eru á einum máli um, at tørvurin á nøktandi tænastu til privatkundan er stórur. Saman hava teir tí í serligan mun sett sær fyri at veita vanligum fólki tænastu, ið er grundað á holla vitan. Hiti fer at bjóða seg at veita tilfar til hita og sanitet í sethúsum og gera smærri umvæl-ingar. Eisini fer Hiti at bjóða sethúsaeigarum at leggja hitan og gera annað arbeiði, sum er knýtt at hesum.

Vøruúrvalið í Hita er merkt av, at tað er privatkundin, ið er raðfestur fremst. Á goymslu eru øll vanlig koparrør, tilhoyr til rør og nógv ymiskt innbúgv til baðirúm; millum annað nøkur góð gosbað, ið verða seld fyri serliga lágan prís í sambandi við upplatingina. Harumframt hevur Hiti stórt úrval av kranum. Í handlinum er øll vøran skipað soleiðis, at kundin lættliga finnur tað, honum tørvar.

Mikudagin eru øll vælkomin inn á gólvið í Hita. Børnini fáa ballónir og Pop Top, og tey eldru ein kaffimunn og okkurt styrkjandi.

Seinastu tíðina hava teir hjá Hita baksast við at gera handilshølini klár til móttøkuna

Mynd: Finnur Justinussen

Hendan fyrsta dagin verður opið til klokkan 18. Vanliga verður Hiti opin gerandisdagar ímillum 08.00 og 17.00 og leygardagar frá klokkan 09.00 til 12.00.

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið at gera brúgv um Hoydalsá og Sundsvegin boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir um avgrevstur, og um neyðugt spreinging, fyri brúgvastøði, stoyping og uppseting av brúgv/brúm.

Útboðið umfatar tvær møguligar loysnir:

1. Felags brúgv um Hoydalsá og Sundsvegin har mettu høvuðsnøgdirnar eru:

Grótflutningur:	2700 m3
Grótfylla:	1800 m3
Betong:	480 m3

2. Atskildar brýr um ávíkavist Hoydalsá og Sundsvegin har mettu høvuðsnøgdirnar eru:

Avgrevstur:	650 m3
Grótflutningur:	2100 m3
Grótfylla:	1800 m3
Betong:	670 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn,

týsdagin 24. mei 2005, kl. 11.00.

Ástaðarfundur verður hósdagin 19. mei 2005, kl. 10.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá:
HMP Consult
Óluvugøta 12
FO-100 Tórshavn
Telefon: 31 22 79

í seinasta lagi mikudagin 4. mei 2005, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

www.sansir.fo

FØROYA BANKI

Móttøka

Eftir 12 ár í Føroyum ynskir **Jørn Astrup Hansen** at venda aftur til Danmarkar. Við endan av apríl 2005 fer Astrup sostatt úr starvi sum forstjóri í Føroya Banka.

Tað hevði glett okkum at hitt viðskiftafólk, yrkisfelagar og vinir til móttøku í hølum bankans í Húsagøtu 3

fríggjadagin 29. apríl 2005, kl. 15 – 17,

har høvi verður at siga Astrup farvæl.

Tað verður við sama høvi møguleiki at heilsa upp á **Janus Petersen**, sum 1. mai 2005 tekur við eftir Jørn Astrup Hansen sum ovasti leiðari bankans.

FØROYA BANKI

Nevndin